# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eru afghonsku myndugleikarnir sinnaðir at lata okkara kvinnur leysar, lata vit eisini kvinnurnar leysar*
*(Taleban-talsmaður)*

# Tingast ikki um suður-koreonsku gíslarnar

**Taleban fær ikki ein einasta fanga fyri teir 21 suðurkoreonsku gíslarnar.**



*-Talan verður ikki um at lata fangar í býti við teir suðurkoreonsku gíslarnar, siga forsetarnir George W. Bush og Hamid Karzai*

-Tað verða ongar tingingar við Taleban um teir 21 suðurkoreanararnar, sum rørslan hevur burtuflutt í Afghanistan, og talan verður ikki um at lata fangar í býti við gíslar.

So greið vóru boðini úr Hvítu Húsunum, eftir at George W. Bush, forseti, hevði hitt afghanska forsetan, Hamid Karzai, í Washington í gjár. Fleiri eygleiðarar gita, at Karzai fekk greið boð frá sínum amerikanska starvsfelaga um, at okkurt munagott má henda í Afghanistan nú, tí nógvir amerikanarar halda, at USA hevur fingið alt ov lítið burtur úr teimum nógvu dollaramilliardunum, sum kríggið í Afghanistan hevur kostað. Millum annað halda eygleiðararnir, at á fundinum í gjár fekk Karzai boð um gera meiri fyri at basa Taleban og at steðga opiumsdyrkingini, sum fíggjar ein stóran part av virkseminum hjá Taleban.

Á middegi í dag hevði Taleban ikki gjørt nakrar viðmerkingar til, at ongar tingingar verða um gíslarnar, men ein talsmaður hjá rørsluni hevur fyrr sagt, at lagnan hjá gíslunum liggur í hondunum á Bush og Karzai.

### Heldur ikki kvinnurnar

Summir eygleiðarar siga, at Taleban kann fáa trupulleikar av, at fleiri kvinnur eru ímillum teir suðurkoreonsku gíslarnar, tí sambært Islam kunnu burturflytararnir ikki beina fyri kvinnunum.

Tað er kanska eisini orsøkin til, at Taleban hevur sagt seg vera til reiðar at lata kvinnurnar leysar, um afghonsku myndugleikarnir lata Taleban-kvinnur leysar í býti. Men hesum hava afghanska stjórnin og USA víst aftur.

# Hon styðjar ikki pápan

Rudolph Giuliani, sum kann gerast forsetavalevni hjá republikanarunum í USA, hevur fingið óvæntaða mótstøðu.

Higartil hava allar kanningar bent á, at republikanski flokkurin í USA fer at stilla Rudolph Giuliani, fyrrverandi borgarstjóra í New York, upp til forsetavalið næsta ár. Men nú hevur hann brádliga fingið mótstøðu frá einum, sum hann og republikanararnir neyvan høvdu hugsað um.

Fyrrakvøldið visti ein heimasíða at siga, at tann 17 ára gamla Caroline Giuliani ætlar sær ikki at atkvøða fyri pápanum, tá hon fær atkvøðurætt til forsetavalið næsta ár. Tvørturímóti er hon limur í einum stuðulsbólki hjá demokratiska senatorinum Barrack Obama, sum eisini ætlar sær at stilla upp næsta ár.

Fleiri av teimum stóru sjónvarpsstøðunum sum CNN og CBS og stór bløð sum New York Times hava gjørt nógv burtur úr tíðindunum, og politiskir eygleiðarar siga, at støðan hjá Caroline kemur pápanum illa við.

Tað hevur annars leingi verið alment kent, at Rudolph Giuliani og børnini, sum hann fekk í øðrum hjúnalagnum, sita ikki serliga væl um sátt. Giuliani er giftur tríggjar ferðir, men øll hjínarbondini eru enda við skilnaði.



*Rudolp Giuliani og børnini Caroline og Andrew*

## STUTT SAGT

### Fóru úr stjórnini

Í gjár løgdu fimm ráðharrar í iraksku stjórnini arbeiðið niður. Tveir teirra eru sunnimuslimar, og tað ber í sær, at nú er eingin sunnimuslimskur ráðharri eftir í stjórnini. Fimm løgdu frá sær í apríl, og seks aðrir fóru í síðstu viku. Eygleiðarar í Bagdad siga, at tað er sera óheppið fyri Nouri al-Maliki, forsætisráðharra, at allir sunnimuslimarnir eru farnir úr stjórnini, tí høvuðsuppgáva hansara var júst at sameina sunni- og shiamuslimarnar.

### Stríð um bumbu

Myndugleikarnir í Georgia vilja vera við, at tvey russisk jagaraflogfør vóru uppi yvir georgiskum lendi mánakvøldið, og at annað teirra slepti einari stórari bumbu, sum tó ikki brast. Sambært georgisku myndugleikunum datt tann 700 kilo tunga bumban niður í bygdina Tsitelubani, sum er einar 65 kilometrar frá høvuðsstaðnum Tbilisi. Men russar vísa tíðundunum aftur. Teir siga, at einki russiskt flogfar var á flogi har á leið mánakvøldið.

### Hjálp úr Svøríki

Danski arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á arbeiðsmegi, men arbeiðsgevarunum nýtist ikki at fara so langt eftir teirri arbeiðsmegini, sum restar í, skrivar Rirzau. Í Svøríki er arbeiðsloysið 4,9 prosent, og tí kunnu arbeiðsgevararnir annaðhvørt fáa sviar til Danmarkar at arbeiða ella flyta arbeiðsplássini til Svøríkis. Tað seinna man vera ein loysn, tí tey seinastu seks árini er talið á donskum fyritøkum í Svøríki tvífaldað.